LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Til Løgmálaráðið

Tórshavn, tann 23. apríl 2025
J.Nr.: LUM-16- 25/07600-11
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Skriv til Løgmálaráðið um vantandi viðgerð av klagu um kommunuval**

*Klagan*
A hevur sent umboðsmanninum klagu um avgerð hjá Løgmálaráðnum frá 5. desember 2024, har Løgmálaráðið boðaði honum frá, at av tí at mál hansara um kommunuvalið í Runavíkar kommunu var ein kæra um valsvik og eitt mál, sum er meldað til løgregluna, ger Løgmálaráðið einki við málið.

Í klaguni verður víst á, at avgerðin frá Løgmálaráðnum varð tikin, áðrenn klagarin hevði sent viðkomandi skjøl og uttan, at ráðið hevði innheintað nøkur skjøl. Klagarin hevur ta fatan, at Løgmálaráðið hevur skyldu at viðgerð kæruna um Runavíkar kommunu, hóast løgreglan arbeiðir við málinum um møguligt valsvik.

*Gongdin í málinum*
Tann 18. november 2024 sendi klagarin kæru til Løgmálaráðið. Í kæruni, sum eisini varð send til Runavíkar kommunu og Fútan, setti klagarin spurnartekin við gegnisstøðuna hjá ávísum kommunustýrislimum í Runavíkar kommunu, sum skuldu viðgera eina kæru frá honum um kommunuvalið í Runavíkar kommunu/Oyndarfirði. Í kæruni reisti klagarin eisini spurningar um mannagongdir og møguligt valsvik í sambandi við valið í Oyndarfirði, tann 12. november 2024.

Tann 29. november 2024 boðaði Runavíkar kommuna frá, at á býráðsfundi, tann 28. november 2024, hevði býráðið samtykt at fylgja ummælinum frá valnevndini, sum var soljóðandi:

> “Valnevndin metir samanumtikið, at valið er farið fram sambært mannagongdum og siðvenjum. Valnevndin hevur ikki – undan og eftir valið – staðfest nakað óreglusemi. Niðurstøða valnevndarinnar er sostatt, at valúrslitið eigur at vera standandi eins og kunngjørt eftir fínteljingina“.

Býráðið gekk sostatt ikki kæruni á møti.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Tann 2. desember 2024 sendi klagarin nýggja kæru til Løgmálaráðið. Hesaferð um avgerðina hjá Runavíkar kommunu. Viðmerkt varð, at hann um fáa dagar vildi venda aftur við fleiri upplýsingum.

Tann 5. desember 2024 skrivaði Løgmálaráðið soleiðis til klagaran:

> "Av tí, at talan er um eina kæru um valsvik og eitt mál, sum er meldað til løgregluna, ger Løgmálaráðið einki við málið."

*Viðmerkingar frá umboðsmanninum*
Eg haldi, at kæran frá A frá 18. november 2024 reisti spurningar bæði av fyrisitingarligum slagi og revsirættarligum slagi.

Av skjølunum, sum eg havi móttikið frá Løgmálaráðnum, síggi eg ikki nakra viðgerð av kæruni frá 18. november 2024, har gegnisspurningurin var reistur. Eg síggi heldur ikki nakra viðgerð av kæruviðgerðini hjá Runavíkar kommunu – herundir spurninginum um mannagongdirnar undir kommunuvalinum í Oyndarfirði.

At spurningurin um møguligt valsvik ikki skal viðgerast av Løgmálaráðnum, men av løgregluni, og at møgulig fylgja av hesum má bíða til løgreglan er liðug við sítt arbeiði, haldi eg vera skilligt og sakligt.

Eg haldi tað tó vera ivasamt, hvørt tað er neyðugt hjá Løgmálaráðnum at bíða við at viðgera fyrisitingarligu spurningarnar um gegni hjá kommunustýrislimum í sambandi við teirra kæruviðgerð, og um kæruviðgerðin hjá Runavíkar kommunu var nøktandi ella ikki.

Eg haldi, at hesir spurningar kundu verið viðgjørdir grundað á tær fyriliggjandi umstøðurnar og óheftir av, ella við fyrivarni fyri úrslitinum av málinum um valsvik.

Eg fari tí at mæla Løgmálaráðnum til at taka málið til nýggja viðgerð og lata meg frætta, hvat víðari hendir við málinum,

Klagað var eisini um, at Løgmansskrivstovan kom til tað niðurstøðu, at einki tyktist at vera at finnast at í viðgerðini hjá Løgmálaráðnum.

Grundað á, at Løgmaður ikki er ein vanligur kærustovnur fyri avgerðini hjá Løgmálaráðnum, men at viðgerðin hjá Løgmanni er ein spurningur um landsstýrismannaábyrgd samsvarandi stýrisskipanarlógini § 33, stk. 3, havi eg ikki viðmerkingar til niðurstøðuna hjá Løgmansskrivstovuni.

Avrit av hesum skrivi er sent klagaranum og Løgmansskrivstovuni til kunningar.

Skrivið verður í næstum lagt á heimasíðu okkara www.lum.fo í navnleysum líki.

Vinarliga

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður